

# Føroysk ung modell í Sirene:

# Í BERUM UNDIRK

– Tað kendist kanska løgið at spíla eina næstan bera rumpu upp í myndatólið hjá myndamanninum, men tað var stuttligt, og eg eri væl nøgd við myndirnar, sigur bert 17 ára gamla havnagentan Turið Weihe Reinert, ið vísir fram nýggjasta mótan innan undirklæðir í danska kvinnublaðnum Sirene, sum í løtuni liggur á øllum hillunum í føroysku, donsku og grønlendsku handlunum

**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**
**Myndir: Elite Model Management**

Turið Weihe Reinert arbeiðir dagliga fyri eitt modellfelag í Keypmannahavn – Elite Model Management. Sirene setti seg í samband við felagið, ið síðan koyrdi uppgávuna víðari til Turið:

***– Hóast eg alt fyri eitt fekk at vita, at eg bert skuldi vera í undirklæðum á myndunum í Sirene, ivaðist eg onga løtu. Eg helt tað ljóðaði stuttligt og tók beinanvegin av tilboðnum.***

Av fyrstan tíð meldaðu tvær vinkonur Turið til eina kapping hjá modellfelagnum Elite Model. Turið kom í finaluna, men vann tó ikki. Men til kappingina var ein dómari úr París, og honum dámdi Turið so væl og bað hana tískil bara heldur koma við sær til París at gera okkurt smávegis arbeiði fyri seg. Turið fór við honum til Go-feese, ið er eitt slag av casting. Har gekk hon í tvær vikur og fekk nógv burturúr. Tá hon kom heim aftur, vóru nógv áhugað at fáa hana at gera ymiskt arbeiði fyri seg – eitt nú kvinnublaðið Sirene, Vi Unge, eitt brúðarblað og ymiskir handlar.

**Einans í undirklæðum – hvat so?**

Turið er væl nøgd við myndirnar í Sirene og heldur ikki, tað var undarligt at standa framman fyri myndamanninum einans í undirklæðum:

***– Øll, ið vóru í hølinum, vóru sera fitt og hjálptu mær væl. Eina løtu kendist tað kanska eitt sindur undarligt at spíla seg fram í næstan berari rumpu framman fyri øllum, men eg havi tikið myndir saman við myndamanninum áður, so tað gekk sum eftir ánni.***

Hóast nýggja Sirene blaðið einans hevur ligið á handilshillunum í nakrar fáar dagar, eru tað longu nógv, ið kenna Turið aftur á gøtuni í Danmark:

***– Dagliga hugsi eg ikki um, um tað eru nógv, ið veita mær ans. Men fleiri hava tó longu kent meg aftur á gøtunum, og sjálvandi geva fleiri mannfólk mær gætur. Enn er tó eingin, ið hevur fingið ilt av, at eg havi tikið hasar myndirnar. Og teir føroyingarnir, eg havi tosað við, halda tað bara vera stuttligt, og eg havi somuleiðis allan vegin fingið fullan stuðul frá familju og vinum.***

Og telefonin hjá Turið hevur somuleiðis gingið heit seinastu dagarnar, og, sum sagt, hava nógv longu ringt og biðið hana gjørt ymiskt arbeiði fyri seg:

***– Men enn havi eg ikki játtað meg til so nógv arbeiði. Eg havi ein skúla at hugsa um.***

Turið gongur á háskúlanum Egå Ungdomshøjskole og hevur eitt nú lærugreinirnar design, ítrótt og tónleik.

***– Mær dámar sera væl at vera á háskúlanum, ið gevur mær nógvar***



*Turið Reinert Weihe*

| | |
|---|---|
| Fødd: | 05.05.88 |
| Hárlitur: | Ljóst |
| Eygnalitur: | Blá |
| Hædd: | 1,78 m |
| Bróst: | 70 cm |
| BH stødd: | 70A |
| Miðja: | 50 cm |
| Mjødn: | 80 cm |
| Klædnastødd: | 34 |
| Skógvastødd: | 37 |